# Almannamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 30/6/2020 |
| Mál nr.: | 19/00181 |
| Málsviðgjørt: | RH |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a.**
(Broytt gjald fyri heimahjálp)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 126 frá 17. desember 2014 um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a., verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 16, stk. 2 verður: "og hjúnafelaga hjá viðkomandi" strikað.

2. § 16, stk. 3 verður orðað soleiðis: "Stk. 3. Er árliga inntøkan lægri enn 50.000 kr., verður ikki goldið fyri heimahjálp."

3. § 16, stk. 4 verður orðað soleiðis: "Stk. 4. Pensjónistur, hvørs árliga inntøka er millum 50.000 kr. og 55.000 kr., rindar 48 kr. fyri hvønn tíma. Pensjónistur, hvørs árliga inntøka er hægri enn 55.000 kr., rindar 3 kr. meir fyri hvønn tíma, hvørja ferð inntøkan hækkar við 5.000 kr."

4. Í § 16, stk. 5 verður: "hjá støkum pensjónisti" strikað.

5. § 16, stk. 6-8 og stk. 11 verða strikað. Stk. 9-10 verða eftir hetta stk. 6-7.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2021.

Almannamálaráðið, 30. juni 2020

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen